# ítróttur

**Nr. 195 • hósdagur • 13. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo**


# TB koppar øllum á

**Av misgávum vendi Fair-Play flaggið hjá FIFA á høvdinum, tá TB við javnleiki móti NSÍ fór undir bjargingarroynd sína. Og nú tykist hetta bera eydnu við sær**

PÁTRÚGV
*Jákup Mørk*

Tá TB tann 28,. august tók ímóti NSÍ, megnaðu teir í seinastu løtu at javna til 4-4, og á sín hátt var hetta eisini byrjanin til bjargingarroyndina, sum liðið nú av álvara er komið ígongd við. Tað vóru kanska ikki so nógv, sum løgdu tað til merkis, men ein partur av frágreiðingini til hetta var kanska eitt mistak frá flaggvørðinum, sum av misgávum hevði koppað gula Fair-Play flagginum á høvdið.

Onkur helt skemtandi til, at hetta kanska hevði borið nakað av hepni við sær, og á tann hátt skundað undir útjavningina, men meira enn tað sama varð ikki lagt í hetta at byrja við.

Næsta heimadystin - móti B36 - vendi flaggið aftur rætta vegin, men tá skarst illa. Bæði so og so. TB tapti dystin 2-1, og ikki minst tók alt rokið móti dystarenda fast hjá bæði felagi og spælarum.

Tá GÍ so kom á vitjan tann 25. september, stóð einki til hjá TB. Somikið illa, at hetta í veruleikanum var ein alt ella einki dystur, og tí hevði liðið tørv á øllum hugsandi stuðuli.

Sum skilst, so vóru røddir frammi um, at tað kanska eisini var vert at koppa leikum fagurt flagginum í høvdið, og skal metast eftir úrslitinum, so var hetta eisini ein heppin avgerð.

TB vann í øllum førum dystin 3-1, og tá teir í næsta dystinum vunnu 1-0 á Skála, mundi seinasti ivin vera beindur burtur. Mistakið við gula flagginum hevði hepni við sær, og so er spurningurin, hvussu tað verður, tá VB kemur á vitjan sunnudagin.

Tá skal TB so triða umfarið á rað spæla heimadyst, og tann dysturin verður kanska júst tann, sum ger av, hvat lið noyðist tungu gongdina niður í aðru deild komandi kappingarár.

Um tað so enn einaferð verður gjørd ein roynd at koppa øllum á høvdinum, fingu vit tó ikki staðfest, tá vit royndu at tosa við umboð fyri TB. Snøgt sagt, so var eingin, sum tóktist kenna nakað til málið…

Vit skulu tó leggja afturat, at hóast flaggið vendi á høvdinum, so var eingin trupulleiki í fair-play andanum, til dystirnar móti NSÍ, GÍ og Skála.



*Á Tvøroyri hava tey í seinastu dystunum roynt at koppa øllum á. Eisini gula leikum fagurt flagginum. Og higartil hevur royndin eydnast heilt væl*

# HB vann gentur 10-12

Í deildini, gentur 10-12 hevur HB í ár tryggjað sær føroyameistaraheitið. Áðrenn seinna FM-finaluumfarið lógu HB-genturnar nr. 2, tá tað ikki hevði gingið heilt eftir vild í fyrra umfarinum á Eiði vikuna fyri. Í seinna umfarinum var tó eingin slingur í valsinum á niðari vølli í Gundadali, og genturnar vunnu trygt sínar tríggjar dystir: 1-0 móti B36, 8-0 móti EB/Streymi og seinast 1-0 móti KÍ. Seinasta dystin tørvaði teimum bert javnleik móti KÍ men vunnu allíkavæl 1-0 sum rættir føroyameistarar. Genturnar hava ongan dyst tapt í ár yvirhøvur.



*Gentur 10-12 føroyameistarar 2005. Standandi frá vinstru eru Katrin Clementsen (venjari), Birita Mortansdóttir, Lisa Helmsdal, Amanda K. Olsen, Hilan W. Jensen, Jenny Kragesteen, Lilian Hellisdal (venjari), Anita Olsen (venjari). Húkandi eru Sára Eysturoy, Annika L. Mortensen, Rebekka Jakobsen, Bjarta O. Johansen, Guðrið Eystberg, Dagmar Johannesen*

# Greipuvinnarar hjá dreingjum



*Greipuvinnararnir í dreingjadeildini eru her avmyndaðir eftir seinasta dystin. Standandi frá vinstru eru tað Bjarni Arnason, venjari, Kristian Mohr Heen, Torvald Abrahamsen, Julian Jónsson, Sjúrður Thomassen, Sigurð Carlsson, Rasmus Nielsen, Jan Olsen og Allan Dybczak, høvuðsvenjari. Húkandi frá vinstru eru tað Janus Mortensen, Brandur M. Nolsøe, Høgni Eysturoy, Johan Ellingsgaard, Jóan Pauli Jacobsen, Kristian í Garði, Johannes Martin Johannesen, Uni Johannesen, Rúnar í Lon og Magnus í Króki*

B36 er eitt av felagnum, sum í ár hevur havt góða úrtøku í yngru deildunum. Serstakliga hevur tað gingið væl hjá dreingjaliðnum, sum við einum sigri á NSÍ í næst seinasta umfarinum tryggjaði sær næsta gullið á árinum. Fyrr í ár vunnu teir nevnliga eisini steypakappingina, og tí vórðu serstakar troyggjur gjørdar undan seinasta dystinum.

Tann dysturin var ímóti VB, og við einum 4-1 sigri kundu dreingirnir soleiðis staðfesta, at teir høvdu besta liðið í deildini í ár.

**-mørk**